

Oskar Grimstad. Mynd: BØRGE SANDNES/FRP MEDIA

# Vil geva oljufeløgum skattalætta

**Jógvan Hugo Gardar**

10.07.2015 - 08:50

Oljan.fo

Oljufeløgini sum eru virkin á norska landgrunninum gjalda í dag 78 prosent í skatti. Hetta heldur norski Framsóknarflokkurin, ið eisini hevur fíggjarmálaráðharran, er alt ov nógv.

- Skatturin hjá oljufeløgunum eigur at lækka fyri at bjarga arbeiðsplássum, sigur orkupolitiski talsmaðurin hjá Framsóknarflokinum, Oskar Grimstad, í samrøðu við Dagens Næringsliv. Hann heldur at skatturin er alt ov høgur, nú oljuprísurin er lækkaður so nógv.

Grimstad vísur á at nógv arbeiðspláss eru knýtt til oljubrunnar sum eru smáir og kostnaðarmiklir at reka, og at høgi skatturin kann vera við til at gera brunnarnar til undirskotsbrunnar, og millum tey økini har oljufeløgini fyrst fara at spara.

Hann sigur einki um hvussu stóran skattalætta hann vil hava, men sigur at tað eru tekin í oljuvinnuni um at oljuprísurin ikki hækkar enn á sinni.

- Um Iran fær eina avtalu um kjarnorkuspurningin, so kunnu teir um stutta tíð senda stórar mongdir av olju inn á marknaðin, sigur Grimstad.

Tað verður einki sagt í Sundvold-samgongyuskjalinum hjá norsku stjórnini um nakran skattalætta. Politiski skrivarin í Fíggjarmálaráðnum, Jon Georg Dale úr Framsóknarflokkinum, sigur við Dagens Næringsliv at tey arbeiða við málinum, og at tey venda aftur til tað.

- Stjórnin vil tryggja oljuídnavinum tryggar lantíðarkarmar á skatta- og avgjaldsøkinum, sigur Dale.